Álit

í

løgtingsmáli nr. 43/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um familjuískoyti
(Orkuískoyti til húski í 2024, 2025 og 2026)

Landsstýriskvinnan í almanna- og mentamálum, Sirið Stenberg, hevur lagt málið fram 3. november 2023, og eftir 1. viðgerð tann 8. november 2023 er tað beint Trivnaðarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 16. november 2023.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin havt fund við Landsfelag Pensjónista, Samtak, Barnabata og landsstýriskvinnuna í almanna- og mentamálum, Sirið Stenberg.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jørgen Niclasen, Árni Skaale, Johan Dahl og Kaj Leo Holm Johannesen) hevur hesar viðmerkingar:

Ógvusligar príshækkingar hava verið seinastu tvey árini. Fyri tey allar lægst løntu varð í fjør samtykt ein skipan við oljuískoti, og í ár samtykti eitt einmælt Løgting eitt hjálparískoti til tey lægst løntu. Talan var um 12.000 kr. um árið.

Hetta hjálparískoytið fer úr gildi á nýggjárinum, og landsstýrið er ikki komið við nakrari leingjan av lógini. Ístaðin er landsstýrið komið við fyriliggjandi uppskoti um eitt orkuískoyti, sum verður 5.000 krónur fyri 2024, umframt at treytirnar fyri at fáa ískoyti verða herdar.

Av teimum 680 húskjunum, sum hava fingið hjálparískoyti í ár, væntar landsstýrið, at uml. 200 av teimum ikki fáa rætt til nýggja orkuískotið.

Talan er tí um eitt reint spariuppskot, sum rakar tey allar lægst løntu í samfelagnum.

Útreiðslurnar til hjálparískoytið verða í ár góðar 8 mió kr. Landsstýrið væntar, at fyriliggjandi uppskot við orkuískoyti bert fer at kosta 2 mió kr. næsta ár, t.v.s. ein sparing upp á 6 milliónir kr., sum gongur harðast út yvir tey á niðastu rók í samfelagnum.

Hetta er ikki einasta byrðan, samgongan leggur á okkara land. Í hesum føri á fólk við allar lægstu inntøkunum, sum eisini fáa eina rød av øðrum byrðum frá landsstýrinum at rinda.

Sitandi samgongan hevur eina rúgvu av avgjaldshækkingum og lítið skiljandi spariuppskotum. Bæði persónar og vinna standa fyri skotum.

Fyri persónar:

- Hækka bensin- og dieselavgjald
- Hækka brennioljugjald
- Hækka el-prísin
- Hækka kringvarpsgjaldið

- Minka stuðulin til avlamisbil
- Hækka egingjaldið á heilivág
- Tey allar lægstløntu fáa hópin av avgjaldrokningum, men ongan skattalætta. Harafturat velur samgongan at lækka teirra orkustuðul úr 12.000 kr. í ár niður í 5.000 kr. næsta ár.
- Sum einasti bólkur, er samtykt, at lestrarstuðulin ikki skal prístalsjavnast í 2024
- Útvald siglandi skulu, sum tey einastu, ið arbeiða heimanífrá, missa frádráttir
- Sjómannafrádrátturin skal skerjast
- Og frádráttir hjá útisiglarum skulu takast burtur

Men:

- Vælbjargaði skulu hava stóran skattalætta
- Akademikarar hava í krónum fingið dupult so stóra lønarhækking sum sjúkrarøktarfrøðingar og Yngri læknar fáa tríggjar ferðir so stóra lønarhækking sum sjúkrarøktarfrøðingar.
- Sendifólk skulu, umframt serskipan av ovurstórari skattafríari viðbót fyri maka og børn, eisini hava barnafrádrátt.

Fyri vinnuna eru rokningarnar stórar:

- 4-falding av toppskattinum á alivinnuna, sum longu hevur kostað 140 arbeiðspláss
- Munandi hækking av tilfeingisgjaldi á fiskivinnuna og teirra manningar, upp í 36% av landingarvirðinum, t.v.s. áðrenn hýrur og útreiðslur
- Revsitiltøk móti Russlandi, sum bara raka føroyska veitaravinnu og tað meint
- Hækka bensin- og dieselavgjald
- Hækka brennioljugjald á vinnuna úr 0 upp til 100 oyru/ltr.
- Hækka tungoljugjald
- Hækka el-prísin munandi á vinnuna
- Nýtt stórt avgjald á F-gass
- Vinnan skal rinda fyri 7 teir fyrstu sjúkradagarnar í mun til 2 nú
- Vinnan rinda størri part av løn til lærlingar, tá teir eru í skúla

Meirilutin heldur, at øll átøkini hjá landsstýrinum gera Føroyar til eitt verri og ójavnari samfelag.

Flestu spariuppskotini hjá landsstýrinum raka hart sperdar familjur, meðan útreiðslur til fyrisiting og lønarhækkingar til tey hægstløntu ótálmað renna avstað.

Landsstýrið er komið við eini røð av avgjøldum á føroysku familjurnar og einum skattalætta, sum tey lægst løntu fáa lítið og einki av. At taka skatt inn frá fólki og so við til dømis hesum uppskotinum gera fólk til klientar og biðja tey søkja um at fáa pengar aftur er ikki gagnligt fyri samfelagið. Heldur eigur landsstýrið at taka avgjaldsuppskotini aftur og broyta skattalættan, so tey við lægstu inntøkunum fáa ein munandi lætta.

Við hesum viðmerkingum tekur meirilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Hans Jacob Thomsen, Súsanna Bertholdsen og Liljan Weihe) hevur hesar viðmerkingar:

Hetta uppskotið er ein partur av lógarpakkanum um eina skattaumskipan, har skatturin verður lækkaður, samstundis sum ymisk gjøld verða hækkað.

Familjur við lágari inntøku fáa ikki í nóg stóran mun ágóða av skattalættanum, samstundis sum tey verða rakt av hækkaðum avgjøldum.

Hetta uppskotið hevur til endamáls at tryggja, at húski við lágari skattskyldugari inntøku ikki detta niðurímillum og hava minni eftir enn upprunaliga.

Uppskotið leggur upp til, at orkuískoytið verður galdandi í 3 ár frá 2024 til og við 2026.

Samanborið við familju- og oljuískoytið er markið fyri, hvussu høgt inntøkugrundarlagið fyri húskið í mesta lagi kann vera, nakað lægri. Fyri familju- og oljuískoyti er markið 290.000,- kr, meðan markið í hesum uppskotinum er 275.000,- kr.

Undir nevndarviðgerðini er fleiri ferðir komið fram, at hetta markið er nakað lágt, tí vandi er júst fyri, at fólk kunnu detta niðurímillum.

Tað kunnu vera húski, ið tjena ov nógv til at fáa ískoyti, men verða rakt av hækkaðum avgjøldum, samstundis sum tey tjena ov lítið fyri at fáa aðrar sosialar veitingar, sum t.d. ókeypis barnaansing.

Minnilutin leggur tí fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

Í § 1, nr. 3 verður í § 2 e, stk. 2 “275.000 kr.” broytt til: “300.000 kr.”

Viðmerkingar
Við at hækka markið frá 275.000,- kr. til 300.000,- kr. fáa fleiri húski møguleika at søkja um orkuískoytið, og vandin fyri, at húski detta niðurímillum, verður minni.

Við hesum viðmerkingum og broytingaruppskoti tekur minnilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Trivnaðarnevndin, 7. desember 2023

Jørgen Niclasen formaður	Liljan Weihe næstforkvinna	Kaj Leo Holm Johannesen
Johan Dahl	Árni Skaale	Hans Jacob Thomsen
	Súsanna Bertholdsen	